*Lagt til rættis:*
*Sunneva H. Eysturstein*
*post@sosialurin.fo*



# við stíli



*Lena og Niclas hugtóku við sínari jarðbundnu framførslu.*
*Mynd: Regin W. Dalsgaard*

Lena sigur um lívið og alt rundanum, tá hon greiðir frá, hvat løgini hjá teimum snúgva seg um. Til dømis segði hon um lagið »Stones in My Pocket«, at tað varð skrivað einaferð, tá hon hevði ein av sínum ringastu døgum nakrantíð og kendi tað sum um, at hon antin mátti doyggja ella skriva tónleik. Hon valdi at skriva, og hetta lagið kom so burturúr. Eitt skilagott val, sum eisini sigur nógv um týdningin, sum tónleikur hevur.

Síðsta tónleikaframførslan og høvuðsnavnið hetta kvøldið, var ORKA við Yann Tiersen. Av tí at bólkurin hevur spælt so nógv í seinastuni, er manningin í ordiligari venjing og spælir framúr væl saman. Íverksetarin av ORKA, Jens L. Thomsen, hevur saman við Yann Tiersen gjørt tvey nýggj ljóðføri, sum Tiersen spælir á. Hesi eru 1) Noisolin: ein violinlíknandi træðpinnur, ið hann strýkur og slær á við einum violinboga og 2) Harpobol: ein harpulíknandi parabol, sum hevur fingið streingir í ta opnu síðuna. Bæði hesi ljóðførini vóru hugtakandi og góvu eina væl hóskandi fyllu til heildina. Eg helt serliga, at noisolinin riggaði væl afturvið lærlampuni, sum Bogi á Lakjuni spælir á. Harpobolin var eisini feit uppá tann mátan, at hon ljóðaði eitt sindur sum ein kinesisk spælidós og gav tí ljóðmyndini eitt heilt nýtt og spennandi element. Onnur nýggj ting í framførsluni hjá ORKA var ein lítil jarnklokka, sum Bogi á Lakjuni eisini spældi á við at sláa eina tong á hana og so eitt stórt rør, ið Jens L. Thomsen brúkti at sláa bongorútmur á. Umframt hetta legði eg eisini til merkis, at Ólavur Jákupsson, sum annars eisini spælir á fløskuorgul og vinkulslípara, brúkti eitt chaos pad til at live-sampla lærlampuna hjá Boga á Lakjuni. Fekk at vita aftaná, at Jákupsson í Fraklandi hevði gjørt hetta við bæði lærlampuna og við noisolinuna hjá Tiersen. Rættiliga imponerandi.

Tað koyrdi generelt væl hjá teimum; pelabassurin hjá Jens L. Thomsen var sikkur og kontantur afturvið tunnutrummunum hjá Jógvan Andreas á Brúnni, og Kári Sverrisson var ordiliga í essinum á bæði boga og sað og á hydroharpuni. Vit hoyrdu løgini frá fløguni hjá ORKA, Livandi Oyða, umframt nøkur nýggj, feit løg, sum eg ikki fangaði heitini á.

Hetta er sikkurt alt ómøguligt at ímynda sær við øllum hesum merkverdugu ljóðførunum, um man ikki hevur sæð bólkin live. Men tað nyttar einki hjá mær at royna at greiða víðari frá, hvussu tað sær út og ljóðar. Tað má upplivast.

ORKA vórðu klappaðir inn aftur, tá teir vóru farnir av pallinum, og framførdu aftur eitt nýtt lag við yrking hjá Jóanes Nielsen.

## Óhepnar løtur

Framførslurnar hetta kvøldið vóru ógvuliga ymiskar, summar framúr góðar og summar eitt sindur haltandi. Alt í alt var hetta tó eitt heilt fínt tiltak líka burtursæð frá ljóðinum, sum var fullkomiliga av leið næstan alla tíðina. Í mest sum øllum framførslunum – tónleiki ella sjónleiki – var einki skil á ljóðstyrkini á teimum ymsu ljóðførunum. Tíbetur lati eg ikki tað oyðileggja eitt upplivilsi, men tað er eitt sindur ov galið. Serliga tá hugsað verður um, at hetta also er í Norðurlandahúsinum, sum nokk hevur tann besta akustikkin í landinum. Man krevur sjálvandi eitt sindur meira, tá umstøðurnar eru í toppklassa, og verður skuffaður, um tað ikki er í ordan.

Harafturat manglaði sum sagt betri coordinering, tá tað skifti millum framførslurnar. Onkuntíð máttu vit sita í totalum friði í upp til fleiri minuttir, meðan bólkarnir gjørdu seg klárar á pallinum. Tað eru allir møguligir mátar, man hevði kunnað forða fyri tí, men eg tími ikki at spæla meira klók uppá tað. Lat fara. Mær dámdi væl at vera har, stemningurin var góður, tónleikurin áhugaverdur, og eg hugnaði mær. Hevði man bara kunnað upplivað meira av slíkum eitt púra vanligt mikukvøld í Havnini.



*Guðrið Hansdóttir var tann fyrsta av teimum fýra tónleikabólkunum, sum framførdu.*
*Mynd: Regin W. Dalsgaard*

**Les meira um Amnesty og Small Places Tour her:**
www.amnesty.fo
www.smallplacestour.info

**Hoyr bólkarnar, sum framførdu, á myspace:**
www.myspace.com/orkaonline
www.myspace.com/lenamusicroom
www.myspace.com/gudridhansdottir
www.myspace.com/theghostband1

**Les um og hoyr tónleikin hjá Yann Tiersen her:**
www.myspace.com/yanntierseninprogress
www.yanntiersen.com



*Ladyfire eru: Filip Mortensen, Andreas Dalsgaard, Hanus Andreasen og Heini Martin Niclasen*
*Mynd: Eyðun Müller*

# Ladyfire í GBOB heimsfinaluni sunnukvøldið

Heimsfinalan í GBOB kappingini verður hildin í Scala í London nú sunnukvøldið 14. og mánakvøldið 15. desember. Í fjør vann føroyska umboðið, Boys in a Band. Spennandi verður at vita, hvussu føroyska umboðið 2008, Ladyfire, fer at klára seg

»Gloym alt um falskar Pop Idol kappingar og alt annað yvirgjørt karaoke tvætl har úti. Hetta er the real deal fyri ordiligar bólkar, sum spæla ordiligan tónleik – live.« Soleiðis stendur at lesa á altjóða GBOB heimasíðuni, sum í hesum døgum boðar frá harðari kapping í heimsfinaluni í London um vikuskiftið. »Støðið á bólkunum er serstakliga høgt, og vit rokna við, at tað liggur dómarunum ein torfør uppgáva fyri framman.«

Føroyska umboðið í ársins GBOB kapping, Ladyfire, skal kappast ímóti 25 bólkum um heiðurin sum »Besti nýggi bólkur í heiminum« og teir 100.000 amerikansku dollararnar. Vit fylgja spent við her heimanifrá og ynskja teimum góða eydnu við framførsluni.



*Boys in a Band vunnu í fjør altjóða GBOB kappingina, og í ár eru tað Ladyfire, ið skulu kappast um heiðurin millum 25 aðrar tjóðir*
*Mynd: Eyðun Müller*

**Les meira um kappingina á www.gbob.com**